# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Thomas Michael Smith 70 ár

Mánadagin 24. apríl fylti Thomas Michael Smith málarameistari í Havn 70 ár.



Thomas Michael er ættaður úr Vági sum næstelstur av teimum 11 børnunum hjá Mariu, f. Strøm, sum var ættað úr Trongisvági, og William Smith úr Vági.

Systkini eru: John (sáli), Thomas Michael, Jens Erik (sáli), Heri (sáli), Ruth, Marjun, Marita, William, Sonne, Josefina og Hanna Maria.

Smith familjan er kend fyri síni listarligu evnir bæði innan tónleik og málningalistina og ikki at gloyma málarayrkið. Thomas Michael bregðar ikki burtur úr ætt. Hann hevur verið í málarayrkinum síðan hann var 14 ára gamal, tá hann fór í læru sum málari hjá pápanum, og síðan hevur hann arbeitt sum málarameistari. Eitt skifti rak hann málinga- og tapethandilin "Ælabogan" í Havn fyri donsku málingafyritøkuna Sadolin & Holmblad.

Hann er kendur sum ein góður handverkari. Hann hevur sett lit á fleiri kirkjur kring landið og er ein av teimum heilt fáu, sum dugir at æðramála. Eisini er hann spesialistur í at prýða kirkjurnar við blaðgulli.

Í 2002 gav hann út bókina "Málarasøgur", sum er ein áhugaverd bók um málarameistarar og málarayrkið sum heild. Tann sum lesur bókina leggur skjótt til merkis, at høvundurin veit havt hann skrivar um og er ein spesialistur á økinum.

Í mong ár var hann faklærari hjá málaralærlingunum á Tekniska skúla.

Thomas Michael er eisini kendur frá tónleikabólkinu Ad Libitum, har hann spælir mandolin.

Eitt av frítíðarítrivunum hjá Thomas Michael er gamlar motorsúkklur. Hann er limur í Føroya Ellisakførum og hevur tvær motorsúkklur, eina BSA frá 1947 og eina Honda frá 1982. Hann er við í øllum "treffum" hjá felagnum.

Thomas Michael er giftur Hervør, f. Wang, úr Havn. Tey eiga børnini Magnus og Anniku. Eisini eigur hann abbadøturnar Miu og Fíu.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Nelly Mortensen**, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í dag kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju fríggjadagin kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Nelly, kunna lata eina peningagávu til Tvøroyrar kirkju: konta í peningastovninum.

Kistan við **Bjarnfríðu Simonsen** ferð úr Tingeyrar kirkju leygardagin 29. apríl kl. 14.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at elskaða kona mín, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Karolina Clementsen**

av Sandi

andaðist í heiminum hósdagin 27. apríl,
65 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Herman**
**Lis, Eyðbjørn og Eyðfinn v/fam.**

---

## Tøkk



Hjartaliga takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt gjørdi 100 ára føðingardagin hjá mær ógloymandi.
Takk til skúlabørnini, lærarir, dagpleygu, barnagarðir og øll onnur sum møtti upp og sungi og spældi fyri mær, fyrapartin.
Takk til Vágs Kommuni og hjálparir, sum fyrireikaði alt so hugnaligt og vakurt og til sangkórið Ljómur, Landstýrismenn, Løgtingsmenn, Ríkisumboði, røðarar og til tykkum øll í møtti upp í VB húsinum og heiðraði meg.
Takk fyri heilsur, blómur og gávur og til familjuna fyri stóra hjálpsami tykkara.

Bestu heilsanir
**Johanna Maria Olsen, Toftalíð, Vágur**

---

## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenlu og hjálpsemi,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Lisa Haraldsen**
Sørvági
(ættað úr Vági)

so brádliga andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur
til Sørvágs missiónshús.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.
Tøkk til øll tykkum, ið á ymiskan hátt hjálptu til
í sambandi við jarðarferðina.
Tøkk til Ingu Poulsen Dam fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til Noomi, sangarar og urguleikara,
ið gjørdu sangin í kirkjuni til nakað heilt serligt
hendan dagin.
Ein serlig tøkk til heimahjálpirnar, ið vóru um hana
tey seinastu 10 árini.
Harrin signi arbeiði tykkara.

*Familjunnar vegna*
**Harald, Sanna, Svenn og Jonna**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýndu samkenslu við
deyða og jarðarferðina hjá elskaðu mammu,
vermóður, ommu, langommu og oldurommu
okkara

**Anna Maria Mikkelsen**
Mia á Støðini
Syðragøta

Tøkk fyri heilsanir, blómur, kransar og gávur til
Filadelfia.
Tøkk fyri troystarrík orð og tøkk til tykkum, sum
hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til
seinasta hvíldarstaðið.

Familjunnar vegna
**Tórur, Katrin og Marjun**

Sosialurin